Landskappingardystur í 1. deild
Sunnudagur 26. september 1999

# LEIKSKRÁ 8

## ÍF - GÍ - 17. umfar í landskappingini



# Tað halda vit.....

Eftir tveir teir seinastu dystirnar eru útlitini fyri at enda á einum 8. plássið, og harvið tryggja sær framhaldandi luttøku í 1. deild komandi ár, vorðin rættuliga døpur. -Vit hava kortini framvegis møguleikan at verða verðandi í deildini. -Men so krevur tað fyrst og fremst, at Sumba endar á einum 10. plássið og aftasta plássið. Heldur hetta, skulu vit leika ein dyst á uttanveltaðum vølli leygardagin 7. oktobur ímóti grannunum úr Leirvík, sum eru á 2. plássið í 2. deild. Hetta kann sanniliga gerast ein torfør uppgáva, sjálvt um LÍF *bert* spælir í 2. deild.

Men áðrenn vit yvirhøvur kunnu tosa um at møta teimum, skulu vit tryggja okkum, at Sumba ikki fær okkum aftur á stigatalvuni. Í løtuni hava teir 3 stig færri enn vit. - Og sunnudagin fáa teir vitjan av NSÍ, sum kann sigast at verða í einum sonnum aldudali. Hendan dystin vinna teir væntandi, og so eru vit ájavnir í stigum, um vit tapa dystin í dag ímótu skerdu grannunum úr Gøtu. Tí mugu og skulu vit vinna dystin í dag, og harvið helst tryggja okkum undan beinleiðis niðurflyting. -Dysturin í dag er sera torførur, sjálvt um GÍ noyðist at leika uttan 5 av føstu leikarum teirra, sum sita uttanfyri leikbannaðir, eftir harða dystin í Gøtu seinasta sunnudag ímóti B36. Men vit kenna øll GÍ. -Teir dríva á allar 90 minuttirnar og meir enn tað, um neyðugt. Hvørjir leikarar eru á liðnum, hevur ongan týdning. -Teir vilja vinna. Men í dag mugu vit somuleiðis hava hendan hugburð, tí dysturin í dag er ein spurnigur um at bjarga seinastu vónunum um møguliga at luttaka í 1. deild komandi kappingarár. -Vit eiga at vinna á GÍ á heimavølli, serliga nú teir mangla so mangar leikarar. Gera vit ikki tað, so hava vit ikki uppiborið at leika í 1. deild. Ikki tí at vit undirmeta skerda GÍ-liðið. -Nei heldur tí vit samanbera, hvussu mangir íbúgvar eru í bygdunum báðum. Í dag skulu vit vinna.

Góðan dyst

# ÍF - GÍ

## 17. umfar í landskappingini hjá 1. deild monnum 26. septembur 1999

## Leikskrá 8

**Útgevari**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd**
*Jákup Frants Larsen*
*Signar á Brúnni*
*Steinbjørn í Lambanum*
*Jógvan á Lakjuni*

**Myndir**
*Sosialurin/Álvur Haraldsen*

**Kápumynd**
*Rógvi og Jóan Petur berjast um bóltin (sum er uttanfyri myndina). Myndin er frá dystinum í Gøtu 20.06 í ár, sum vit taptu tepur 2-1*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Prent**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting**
*Rógvi Róin*

# Gestirnir í dag

ÍF bjóðar teimum at vera vælkomnar til Fuglafjarðar

## GØTU ÍTRÓTTARFELAG

Gøtu Ítróttarfelag er stovnað í 1926 og er sostatt eitt av teim gomlu føroysku ítróttarfeløgunum. Men hóast ítróttur - eisini bóltspæl - varð íðkað í bygdini í mong ár, so er tað ikki fyrr enn í nýggjari tíð, at GÍ hevur gjørt seg galdandi í fótbólti.

Í dag er GÍ rættiliga kent fyri síni fótbóltsbrøgd, bæði her á landi og í Europa-cup, sum ikki minst hevur givið nakrar krónur á kistubotnin okkurt ári. Men í gomlum døgum, t.e. áðrenn 1970, vóru ítróttarfólkini í grannabygdini mest kend fyri hondbóltin, sum tey eisini kláraðu seg væl í.

Eftir at GÍ-vøllurin í Serpisgerði varð tikin í nýtslu mitt í 60'unum, og eitt miðvíst ungdómsarbeiði av álvara byrjaði, hava Gøturnar staðið sum *ein* maður á vøllinum, og ongastaðni í heiminum hevur ein bygd í hesi støddini fostra so mangar góðar fótbóltsleikarar, sum júst Gøta.

Gí vann 2 deild í 1979, sama árið sum ÍF fyri fyrstu, og einastu, ferð nakrantíð gjørdist føroyameistari. GÍ vann sítt fyrsta føroyameistaraheitið í 1983, og hetta bragd hava teir so endurtikið í 1986, 1993, 1994 og 1995. Í steypakappingini hava teir eisini gjørt seg galdandi, og teir hava hvørt ár góð lið í at kalla øllum deildum.

Nú ljóðar tað kanska sum um vit hava hug at skamrósa GÍ, men rætt skal vera rætt, teir hava verið knáir, og tola óivað at fáa rós.

Liðið, sum í dag skal leika í Fuglafirði, er sum kunnugt nakað skert, tí fleiri leikarar seinasta vikuskifti fingu ávaringar sum geva leikbann. Tí kann sigast, at hóast GÍ á papírinum framvegis er "favurittur", so er ikki sørt av spenningi, tí tað stendur nógv upp á spæl hjá báðum liðnum - bæði so og so. -GÍ skal royna at fáa so "dýrt metal" sum gjørligt, og ÍF skal royna at halda seg í deildini.

Fyri at vita hvørjar vónir gøtumenn hava áðrenn dystin, ringdu vit til tann nú 34 ára gamla Paula Jarnskor, og spurdu, hvat hann helt um komandi dyst. Tað verður sjálvandi ikki lætt, nú helvtin av liðnum er burtur, segði Pauli, men hann legði afturat: -Vit eiga fleiri góðar leikarar, sum væl kunnu koma inn á liðið, so eg havi sjálvandi heilt gott mót - tí vit skulu jú vinna, sjálv um ÍF eisini hevur brúk fyri einum sigri.

Pauli Jarnskor nevndi, at t.d. er tað upplagt, at Símun Petur Justinesen nú kemur við aftur, tí hann hevur roynst sera væl í 2. deild, har hann herfyri skjeyt øll 4 málini, sum GÍ fekk tann eina dystin. Tá vit spyrja um styrki og veikleikar hjá GÍ, sigur Pauli, at styrkin er hetta, at teir stríðast til síðsta minutt. So leingi dómarin ikki hevur blást dystin av, so trúgva vit uppá tað, og tað hevur givið fleiri stig í ár. Veikleikin er tað, at hópurin er nakað tunnur til at vit eru eitt topplið, og so tað at tað fara ov nógv "bílig" mál inn.

Tá vit spyrja Paula um, hvussu hann heldur at heiðursmerkini í ár verða býtt, letur hann hugflogið fara víða, og hann vísir á fleiri møguleikar. -Um alt lagar seg til okkara fyrimun, so ....ja ...!! men roknast kann við, at um KÍ fær gullið, so fáa vit heilt bombi- sikkurt silvur, men, leggur Pauli Jarnskor aftrat, -so skulu vit eisini vinna í dag, og tað gera vit. - Livst so spyrst.

# FÓTBÓLTSHAGTØL

## STØÐAN - 1. DEILD MENN

| Lið | Dystir | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. KÍ | 16 | 12 | 2 | 2 | 34-16 | 38 | 6-2-0 | 6-0-2 |
| 2. GÍ | 16 | 10 | 3 | 3 | 38-23 | 33 | 7-0-1 | 3-3-2 |
| 3. B36 | 16 | 10 | 2 | 4 | 47-21 | 32 | 7-0-1 | 4-2-2 |
| 4. HB (M/S) | 16 | 9 | 4 | 3 | 29-14 | 31 | 4-2-2 | 5-2-1 |
| 5. NSÍ | 16 | 6 | 4 | 6 | 23-22 | 22 | 4-2-2 | 2-2-4 |
| 6. VB | 16 | 5 | 3 | 8 | 15-24 | 18 | 4-2-2 | 1-1-6 |
| 7. B68 | 16 | 5 | 3 | 8 | 21-33 | 18 | 2-2-4 | 3-1-4 |
| 8. B71 (U) | 16 | 3 | 5 | 8 | 24-35 | 14 | 3-3-2 | 0-3-5 |
| 9. ÍF | 16 | 2 | 4 | 10 | 18-39 | 10 | 1-2-5 | 1-2-5 |
| 10. Sumba | 16 | 1 | 4 | 11 | 19-41 | 7 | 1-3-4 | 0-1-7 |

## Málskjúttar

| | |
|---|---|
| Jákup á Borg, B36 | 15 |
| John Petersen, B36 | 14 |
| Kurt Mørkøre, KÍ | 13 |
| Eli Hentze, B71 | 11 |
| Nebojsa Veljkovic, Sumba | 10 |
| Aleksander Radosavljevic, GÍ | 9 |
| Súni Fríði Johannesen, HB | 9 |
| Marcelo Marcolino, B68 | 8 |
| Henning Jarnskor, GÍ | 8 |
| Rógvi Jacobsen, KÍ | 8 |
| Heðin á Lakjuni, KÍ | 6 |

## Dystarskrá

26.09 B71 - VB
26.09 B68 - HB
26.09 B36 - KÍ
26.09 SUMBA - NSÍ

**1. deild menn - 18. umfar**
02.10 VB - SUMBA
02.10 HB - B71
02.10 GÍ - B68
02.10 KÍ - ***ÍF***
02.10 NSÍ - B36

**3. deild menn - 16. umfar**
26.09 VB - TB
26.09 HB - B71
26.09 GÍ - B68
26.09 KÍ - ***ÍF***
26.09 FSV - B36

# PALFINGER

Føroya mest seldi krani í 1997-1998-1999

PALFINGER kranar verða framleiddir í Eysturríki. Palfinger er heimsins størsti kranaframleiðari. Kranarnir verða framleiddir úr hástyrkistáli og eru deseignaðir til tær torførastu arbeiðsuppgávurnar.




**LASTBILAKRANAR 0,8 TIL 75TM**
- FOLDIKRANAR
- TELESKOPKRANAR

**MARINEKRANAR 2,1 TIL 83TM**
- FOLDIKRANAR
- TELESKOPKRANAR
- STÍVARMSKRANAR
- KNEKKARMSKRANAR

**Lastbilakranar:**

| | |
|---|---|
| Kári Zachariassen p/f | PK19000C |
| Hans Egil Joensen p/f | PK19000C |
| Hans Egil Joensen p/f | PK24500E |
| Hans Egil Joensen p/f | PK54000E |
| Hákun Zachariassen | PK24500E |
| Erling Dam | PK16000C |
| Havnar Timburhandil | PK19000E |
| Tórshavnar Sløkkilið | PK18080C |
| Niklas Davidsen | PK19000C |
| Føroya Tele | PK9001A |
| Rodmund Andreassen | PK21000C |
| Salmon River p/f | PK5000A |
| ÓCS Fiskaflutningur | PK16000D |

**Marinekranar:**

| | |
|---|---|
| Faroe Slamon p/f | PK3700MA |
| Tórsvík m/s | PK19000MC |
| Vest Salmon p/f | PK3700MA |
| Tjørnunes m/s | PK1600MA |
| Faroe Salmon p/f | PK3700MA |
| Vestfisk m/s | PK32080MB |
| Funningslaks - flaki | PK14080MA |
| Knykil m/b | PK5000MA |
| Sjólaksur p/f | PK8080MB |
| Vestborg m/s | PK23080MB |

**KJ - HYDRAULIK**

Boks 110 • FO-530 Kambsdalur • Fuglafjørður
Tlf. 444170 • Fax 444265 • E-mail: kj-hydr@post.olivant.fo



Hárstovan Yndi
Súsanna K. Róin · Norma Egholm
530 Fuglafjørður · tel. 444490

Landsins besta og største úrval av ítróttarheiðursgávum




Gravering ókeypis!
Vit seta títt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað
FA. EILIF ARGE
KLAKSVÍKSVEGUR · 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 · FAX 45 75 76



ALT TIMBUR-,
FORSKALLINGS-
OG
JØRÐARBEIÐI



Sp/f TIMBRA
BYGGIVIRKI
530 FUGLAFJØRÐUR
TEL 444217 · FART. 288696 - 288217

FERÐASEÐLAR
KRING ALLAN KNØTTIN
Travel Agent
Telefon 456363
Telefax 457373
FO-7000 Klaksvík




N.P. Gøta 28
Box 109
FO-700 Klaksvík
Telefon 45 63 63

*Hugleiðingar:*

# *Fyri 28 árum síðani*

*Eftir Jógvan á Lakjuni*

Í einari leikskrá fyrr í ár varð greitt eitt sindur frá tí fyrsta árinum hjá ÍF í fyrstu deild ella *meistaradeildini*, sum tað tá æt. Hetta var í 1971, og her skal bara verða trivið í okkurt aftrat.

27. april 1971 skrivar Dimmalætting í ítróttarteiginum: ***Í fótbóltsdeildini er tann stórhending farin fram, at ÍF nú hevur meldað til meistaralið - sum sostatt verða seks í tali!*** Hini liðini í fremstu røð vóru tey "gomlu", VB, TB, KÍ, HB og B36, sum jú høvdu verið í fyrstu deild í langar tíðir.

Hetta var sera stórt stig hjá ÍF at taka, og hyggja vit at úrslitunum, so vísti tað seg eisini at vera ein stór avbjóðing. Liðið spældi 9 landskappingardystir og tapti allar uttan ein, og tað var ímóti B36 í Havn, har úrslitið bleiv 2-1 til ÍF. Liðið fekk kortini 4 stig hetta fyrsta árið í meistaradeildini, av tí at TB ikki møtti upp til tann seinasta dystin.

Endaliga støðan í meistaradeildini varð henda: HB fekk 18 stig, KÍ 16, VB 11, TB 6, B36 5 og ÍF 4.

Av málúrtøkuni hjá ÍF sæst, at liðið hóast alt skoraði 13 mál, og tað er ikki so heilt lítið í bara 9 dystum, men í hinum endanum gekst minni væl, 57 mál fóru inn.

Í Dimmalætting hetta árið verða nakrir av dystunum umrøddir, og hóast fullfíggjaður málskjúttaralisti ikki er uppgjørdur, so sæst, at Jákup Frants skeyt fyrsta málið hjá ÍF í meistaradeildini, og at bæði Sam og Hans Elias megnaðu at gera hat-trick.



Áku gjørdi eisini hat-trick hetta árið, men tað var í einum dysti í kappingini um Ísafjarðarsúluna, sum steypakappingin tá varð nevnd. Hesin dystur var ímóti TB. Dimmalætting sigur um dystin, at spælið ongantíð bleiv gott, og TB kom á odda 2-0. Men

FAROE SHIP -TIL TYGARA TÆNASTU

Stytsta leið til megin-landið



SKIPAFELAGIÐ FØROYAR

Takrennan skiftast?

*....hygg inn til okkara.*

Vit hava stórt úrval av takrennum

*....fyri ein sámuligan prís*

P/F Fuglafjarðar Timburhandil
530 Fuglafjørður
Tel. 444126

Vit senda um alt landið



P/F Thomas Dam á Hálsi
Heykavegur 3
Tlf. 311400 Fax 315574



Ivast tú í, hvar tú skalt avreiðast???



Tað nýtist tær ikki longur....

*.....teir tóku ímóti mær á gamla "Ísvirkinum"*

Sp/f Alfa Seafood
FO- 530 Kambsdalur
Tlf.: 444951 · Fax: 444898
Mobil: 283651

Atlantic Airways

Canon

KOPI • FAX • PRINT

K4

GER SKRIVSTOVUR VIRKNAR

FARODANE

Telefon 311414 • Fax 317534



STATOIL

...tú fært tað hjá Statoil

**P/F BOÐASTEINUR**
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo

*Blómuhandilin*
**Orkis**
**625 Glyvrar**

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

***tel 44 82 89***
***fax 44 89 89***



**ALILAKS**
Úti á Klovningi
530 Fuglafjørður • Tel 444890

**Vit hava altíð**
***- stoypisand***
***- pussisand***
***- norskan sand***
***og - óskilt ral***
**á goymslu**

*Somuleiðis átaka vit okkum koyring við kranalast*

SANDGREVSTUR P/F
Norður i Gerði 7
FR-530 Fuglafjørður
Tlf.: 444121

HEWLETT® PACKARD

Expanding Possibilities

*Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard).*



Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....

Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.

Avtala um viðlíkahald av teld-um/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.



J-J. Teld

530 Fuglafjørður

tel.: 21 03 83

e-post: jjteld@post.olivant.fo

**Altíð nýbakað breyð**

***Sunnumorgnar fæst morgunbreyð á hesum:***

**Shell í Gøtudali**
**Statoil í Leirvík**
**Kiosk Vár í Saltangará**
**Tock Shop í Klaksvík**
**Statoil á Strondum**

**BREYÐMOLIN**
530 Fuglafjørður • tel./fax 44 4388

*Vit hava hópin av*
- *meturvørum*
- *tógvi*
- *vøkrum toyi til gardinur og nógv, nógv annað til hondarbeiði.*



**Hjá Marjun**
FO-530 Fuglafjørður
tel. 44 44 94

**Vit hittast í**

**fk**

**Fuglafjørður**

**Soft Ice**
***-til alla familjuna***



***8,-***
***10,-***
**Drúss** ***2,-***

**Vit hava eisini stórt úrval av grillmati**

**Grillin**
tel. 44 43 15
Opið er frá: 17.00-23.00

BAADER®

*Vit hava hópin av eykalutum til BAADER -maskinur á goymslu*

**Pf PETUR LARSEN**

Postmoga 64 - Traðarvegur 7 - 530 Fuglafjørður
tel. 44 41 74 - fax 44 42 85

*Stíg inn í ein reinan heim....*



VIT REINSA

klæði tygara bæði skjótt og væl - til eina og hvørja tíð.
Eisini rulla vit dúkar.

**Fuglafjarðar Reinsarí**

**530 Fuglafjørður - Tel. 44 40 52**

Opið er mán.-frí.: 15.00-18.00

# Fótbóltsskógvar

**Copa Mundial**



**899,-**

adidas

**Iseran TRX Liga**



**699,-**

**King Top D1**



**899,-**

PUMA

**Lazio Top GC1**



**499,-**

## *ÍTRÓTTUR*

625 Glyvrar · tel. 447399

## P/F THOMAS DAM

ÍTRÓTTUR · N. Finsensgøta 5 · Postmoga 1108 · 110 Tórshavn



Í
Vørðsluni
vinna tygum
altíð....

VØRDSLAN

Í Støð 6
530 Fuglafjørður
Tel. 444747
Fax 444780

Opið:
Mán.-Hósd.: 10.00 - 17.30
Friggjadag: 10.00 - 19.00
Leygardag: 10.00 - 14.00

ZAFIRA
-tann síðsti nýggi OPEL LINE



Frá 1-7 persónar uppá 15 sek.

ROYNDARKOYR ZAFIRA HJÁ
OPEL
við Oyggjarvegin
P/F Meinhardt Arge
Tlf. 316161 • 216160

FT
Atlantic Airways
MAERSK AIR
ICELANDAIR
SAS



Faroe Travel
Tlf. 31 26 00



Sparikassin
er tann rætti,
tá ið tað
snýr seg um
at ráðgeva ungum
í peningamálum

FØROYA SPARIKASSI

• Skógvar til øll
• Klæðir til børnini
• Gardintoy
• Tógv
• Handarbeiði v.m.

*Handilin við fjølbroytta úrvalinum*

Toystovan
530 Fuglafjørður
tel. 444637




Lampur
Gávulutir
Vanligar el-lutir

Avsláttur

Lampur -20%

Gávulutir -50%

Lampu- og gávubúðin
v/Poul J. Hansen
530 Fuglafjørður
Tel 444055

*Bilverkstaðið*
v/Magnus Onghamar
Kambsdalur
530 Fuglafjørður
Tel./fax 44 49 43



Vit gera allar
umvælingar,
t.d. dekkskifti,
oljuskifti
og annað
mekaniskt.

Støkk inn á gólvið!!!




ØLL
LASTVOGNS-
KOYRING

við kranabili og dumpara verður gjørd

Kári Zachariassen Pf.
530 Fuglafjørður
Telf. 444245 • Fax 445045
Fartelf. 284245 • 287245

# Ársins ÍF'ari



## *Dagsins maður*

*Ábraham Hansen*

*The Grand Old Man, Ábraham (her í NSÍ-búna), gjørdist klárt best umtókti leikarin ímillum áskoðararnar í dystinum ímóti B71. Men hann leikti eisini væl, tað kunnu vit bert staðfest. -Og fyri innsatsin næstseinasta sunnudag, býður Poul døgurða á Muntra fyri tvey.*

### Atkvøðutal

| | ÍF-B71 | Íalt |
|---|---|---|
| Ábraham Hansen | 124 | 164 |
| Rúni Joensen | 43 | 187 |
| Eyðolvur R. Petersen | 38 | 81 |
| Bárður á Lakjuni | 26 | 26 |
| Áslakur R. Petersen | 20 | 153 |
| Rógvi Róin | 10 | 153 |
| Roy Róin | 8 | 49 |
| Tórstein Joensen | 5 | 44 |

Atkvøtt verður til allar heima- og útidystirnar hjá ÍF í landskappingini. Tann leikarin, ið veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast.


FA. EILIF ARGE
KLAKSVÍKSVEGUR 700
KLAKSVÍK

- *Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.*

1.

- *Ársins ÍF'ari fær eitt gávukort á kr. 1.000,-*

2.-3.

- *Leikari nr. 2 og 3 fáa hvør sítt gávukort á kr. 500,-*

Restaurant Muntra



- *Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.*


## Atkvøðuseðil

### Ársins ÍF'ari

Dystur: ______________

Nr. 1 (5 stig): ______________________
Leikari

Nr. 2 (3 stig): ______________________
Leikari

Nr. 3 (2 stig): ______________________
Leikari

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ______________________ Tel.: ______________

# Eykalutir til bilin




p/f ESMAR SIMONSEN

Kambsdalur Tlf. 444405

**Nýggjheit**

til viðlíkahaldsarbeiði

PERAGO skivur



Kunnu nýtast til:
- *metal*
- *betong*
- *træ v.m.*

- *Lætt og bíligt alt. til sandblásing*
- *Krevur einans eina el. borimaskinu*
- *Úrslitið minnir mest um sandblásing*
- *Sera haldgóðar skivur (2-4 ár)*

***JB Trade***

tel. 316887

Ynskist vitjan - ring fart. 282165 (Petur)

**HeimaBankin**

**Flytið heimanífrá...**



**...tá ið best liggur fyri**

Nú kunnu tygum eisini avgreiða tygara vanligu bankaørindi heima við hús á egnari teldu.

Ynskja tygum at fáa meira at vita, eru tygum altíð vælkomin at venda tygum til starvsfólk bankans, sum eru fús at greiða frá.

FØROYA BANKI

**Shell**

Ein dyggur samstarvsfelagi

**Alt timbur- og snikkaraarbeiði verður gjørt**

*Ring*

*- og fá eitt tilboð*

**TIMBUR & SNIKKARAARBEIÐI**

V/JAN MOHR
BØVEGUR 49
FO-530 FUGLAFJØRÐUR
TEL. 44 49 49

# Sølubúðin - í ovaru hæddini...

## *Prísir*



Kaffi
Te
Heimabakað køka **5,-**
Sunkist

Fleiri sløg av sigarettum

Toast
Sodavatn 1/2 ltr. **10,-**

***Eisini fæst ymiskt góðgæti til keyps fyri sámuligan prís.***

***......hevur opið meðan 1. deildardysturin er***

*(framhald frá bls.7)*

so tók Áku sær um reiggj og skoraði 3 mál (í 27., 38. og 42 min.), soleiðis at ÍF kundi fara til hálvleik við 3-2 leiðslu. ÍF megnaði tó ikki at vinna dystin, tí í seinna hálvleiki gjørdi Petur hjá TB hattrick, og dysturin endaði við 6-3 til TB.

Um spælararnar hjá ÍF í hesum dysti sigur Dimmalætting: *"Hjá ÍF var Signar, sum leikaði aftasti maður í verjuni, avgjørt bestur. Hann dugir at rokna út, hvussu spælið lagar seg, leikar tekniskt vakurt og roynir altíð at avlevera ístaðin fyri altíð at sparka himmalhøgt, sum so mangur annar gjørdi henda dag. Sam er eisini tekniskt góður leikari - hevur kanska lyndi til at halda ov leingi upp á bóltin viðhvørt. Áku fekk eisini væl burturúr, serliga í fyrra hálvleiki. Hetta er ikki bara sagt, tí hann gjørdi øll málini, men tí hann av og á vísti rætt vongspæl: oman til baklinjuna og innfyri."*

**Myndin á bls. 7**

Henda myndin stóð í blaðnum, *Árið, ið fór 1971*, og teksturin undir myndini var:

*Hetta var fyrsta árið hjá ÍF í meistaradeildini, so ein væntaði ikki tey stóru úrslitini, men tað eydnaðist teimum tó at fáa 4 stig, 2 móti B36 og 2 móti TB, sum ikki møtti upp til seinasta dystin. Á myndini av ÍF síggja vit aftast frá vinstru: Sam Jacobsen, Jákup Frants Larsen, Signar Hansen* (á Brúnni), *Dánjal Jákup Petersen (Áku), Jógvan á Lakjuni, Herman Midjord, Leivur Harryson, Hans Sederius Joensen, Steinbjørn í Lambanum, Birgir Thomsen og Hans Elias Joensen.*

# 20 SPURNINGAR TIL LEIKARIN



1. **Navn:** Rúni Joensen
2. **Føðingardagur:** 28-09-74
3. **Starv:** Prentari hjá Einars Prent í Tórshavn
4. **Hvat er tín styrki á vøllinum?** Tað mugu onnur taka støðu til
5. **Hvat er tín veikleiki á vøllinum?** Málburðurin er skammiligur og ov illsintur á vøll-inum
6. **Hvar í Føroyum er torførast at leika?** Beint nú - í Gøtu ímóti GÍ
7. **Hvør er Føroya besti leikari?** Sámal Joensen - eingin ivi um tað
8. **Hvør er tín fyrimynd á fótbóltsvøllinum?** Jens Martin Knudsen, ið eg meti sum tann besti í heiminum
9. **Hvat er heimsins besta lið?** Manchester United
10. **Á hvørjum vølli í heim-inum kundi tú hugsað tær at spælt? Á** Á Old Trafford ímóti Liverpool
11. **Hvat dámar tær ÍF-áskoðararnar?** Piddi og teir er best - teir áttu sigurin á Toftum. Men hinir kundu stuðla meir
12. **Hvat heldur tú um tað, bløðini skriva um teg og annars fótbólt sum heild?** tað er so vánaligt, at ja...
13. **Hvørji frítíðarítriv hevur tú?** Fyrst fótbólt, og so konuna aftaná kl. 23.00 ha, ha, ha..
14. **Hvør rættur er tín lívrættur?** Bollar og kakao frá Ommu
15. **Hvønn drykk dámar tær best?** Faxe Kondi16. **Hvørji klæðnapløgg dámar tær best at vera í?** Arbeiðsklæðir
17. **Hvør er bók er tann besta tú hevur lisið?** Bankabókin hjá konuni
18. **Hvør filmur er tann besti tú hevur sæð?** Braveheart
19. **Hvønn sjónleikara dámar tær best?** Mel Gibson og Magni Jarnskor - kanska heldur øvugt
20. **Hvørjar framíðarætlanir hevur tú?** Eg taki ein dag á gangin, tí vit vita ikki, hvat framtíðin hevur at bjóða

## Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Boks 94
FO-530 Fuglafjørður
tel. 444636
mynttel. 444620
fax 444636

**Aðalnevndin**
Roy Róin, *formaður*, tel. 445176
Jón N. Olsen, *næstformaður*, tel. 444650
Unn E. Petersen, *skrivari*, tel. 444053
Símun Fornagarð, *peningarøkil*, tel. 444343

**Fótbóltsnevndin**
Harley Joensen, *formaður*, tel. 444696
Sigfríður Abrahamsen, tel. 444650
Hildigarð Eliasen, tel. 444343

**Samskipanarleiðarar**
Diana B. Lervig, tel. 444845
Ragnhard Petersen, tel. 444353

**Ábyrgdarfólk**
Tórstein Joensen, *Vøllurin*, tel 444706

**Venjarar**
***1. deild og unglingar***
Piotr Krakowski, tel. 445105
***3. deild***
Bogi Lervig, tel. 444845
***5. deild***
Jón N. Olsen, tel. 444650
***Old Boys***
Sonni Jensen, tel. 444975
***Dreingir, smádreingir, piltar, gentudeildin, smágentur, gentur 10-12 ár og pinkur***
Sofus Baldvinsson, tel. 444645
***Smápiltar a-c***
Høgni/Ragnhard, tel. 444245/444353

## *STUÐULSRENNINGIN 1999*

Mikudagin 22. septembur skipaði ÍF fyri stuðulsrenning fyri børn í aldrinum 6-17 ár. Runnið varð rundan um vøllin í ein hálvan tíma. Tiltakið var ógvuliga væl móttikið av øllum, og tað vilja fyrireikararnir takka fyri. Øll tey, ið stuðlu vóru við í lutakastinum um trý krov. Vinnararnir eru kunngjørdir niðanfyri, umframt tey sum runnu longst og tey sum savnaðu mest pening inn.

**Hesi hava vunnið krov:**
***Jákup O. Gaard*** - stuðlað Bárði Rasmussen
***Sigurd Simonsen*** - stuðlað Jens Allan
***Maria á Lakjuni*** - stuðlað Jákup á Lakjuni

**Hesi runnu longst:**
*Pinkur og Gentur 10-12:*
Hanna Poulsen (6.308m)
*Smápiltar B-C*
John Eliasen (5.976m)
*Smápiltar A og Piltar*
Jákup á Lakjuni (6.640m)
*Gentur 12-14 og 14-17*
Jónfrið Joensen (4.648m)

**Hesi savnaðu mest pening:**

| | |
|---|---|
| 1. Guðrun Lervig | kr. 2.822,00 |
| 2. Kristian Sofus Petersen | kr. 2.788,80 |
| 3. Tóra N. Olsen | kr. 2.071,68 |
| 4. Jan N. Olsen | kr. 1.452,50 |
| 5. Jákup á Lakjuni | kr. 1.128,80 |
| 6. Jákup Mohr | kr. 1.015,92 |
| 7. Bogi R. Petersen | kr. 906,36 |
| 8. Lilja Hansen | kr. 906.36 |
| 9. Vincent Jacobsen | kr. 733,72 |
| 10. Erla K. Róin | kr. 697,20 |
| 11. Jónfrið Joensen | kr. 697,20 |

# *Dysturin í dag*

**ÍF**

1. Rúni Joensen
2.
3. Abraham Hansen
4. Viggo Johannesen
5. Sigfríður Abrahamsen
6. Roy Róin
7. Rógvi Róin
8. Rúni Petersen
9. Robert Cieslewiscz
10. Áslakur R. Petersen
11. Eyðolvur R. Petersen
12. Mortan Thomsen
13. Tórstein Joensen (liðsk.)
14. Bárður á Lakjuni
15. Ken Bærentsen
16. Emil Toftegaard
17.

**Venjari:** Piotr Krakowzki
Hj.venjari: Bogi Lervig
**Liðleiðari:** Símun Fornagarð
Eilif Eliasen

**GÍ**

1. Sunvard Joensen
3. Henning Jarnskor
4. Erland Tvørfoss
5. Poul Ennigarð
6. Jóan Petur Olsen
8. Pauli Jarnskor
13. Svenn Olsen
14. Aleksander Radosavljevic
15. Magni Jacobsen
16. Alvi Justinussen
17. Leivur Hansen
18. Símun Petur Justinussen
19. Jónreid Dalheim

**Venjari:** Jóhan Nielsen
**Liðleiðari:** Jørgin Gudmundsson

*Leikarayvirlitið er vegleiðandi*



## *Dómari* — *Oddmar Andreasen*

**Linjuverjar úr HB**



## *Bóltsponsorur* — J-J. Teld